# HEILSANIR



**Góða fastir**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum. Alt tað besta framyvir.
**Ynskja Jóan Petur, Inga Maria og Jákup Andrias**



**Hey Mariann**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum. Hetta kvøldið var skeg, ha?
**Heilsan krúllan, ið situr við síðina av.**



**Góða mamma, vermamma og omma**
Hjartaliga tillukku á runda degnum tann 21. Vónandi hevði tú ein góðan dag.
**Heilsan vit á Kagsåkollegiinum**



**Góða fitta mamma**
Hjartaliga tillukku á tínum 28 ára degi 1/9. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vit elska teg.
**Bestu heilsanir Annika og Rebekka**



**Góða elskaða kona**
Hjartaliga tillukku á 60 ára degnum. Takk fyri alt, ið tú hevur verið fyri meg.
**Karar heilsanir maður tín**



**Góða omma, mamma og vermóðir**
Hjartaliga tillukku á 60 ára føðingardegnum. Alt tað besta framyvir.
**Kærar heilsanir Kris, Jónvá og Dánjal**



**Góða Petra**
Lukku og gleði á tínum 28 ára degi 1/9. Alt gott framyvir.
**Ynskja vit 3**



**Hey Smiley**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum. Takk fyri mangar góðar løtur saman. We love you.
**Heilsan vinkonurnar**



**Góða omma, mamma og vermóðir**
Hjartaliga tillukku á tí runda degnum. Vit elska teg nógv, og ynskja tær alt tað besta í framtíðini.
**Kærar heilsanir Malan, Annika og Jón**



**Góða Beinta Byrgitte!!**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum. Guð signi komandi tíð.
**Ynskja omma og abbi**



**Góða elskaða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 1. sept. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja vit, Andrias**



# TILTØK

## FØÐINGAR

6. august fingu Eileen Sandá og Hans Petur Joensen, Frederiksberg, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4000 gr.

6. august fingu Durita og Jens Olsen, búsitandi í Hull í Onglandi, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4250 gr. Hon eitur Mary Grace.

25. august fingu Ann Mørkøre og Tórhallur Randrup, Hvalba, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

27. august fingu Ribjørg og Kári Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2600 gr.

27. august fingu Fríðgerð og Jónfinn Egilsnes, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3950 gr.

27. august fingu Óluva Klettskarð og Andras Sólstein, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3200 gr.

28. august fingu Malena og Torkil Hansen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3450 gr.

28. august fingu Irdi Lið Johansen og Jørgin Gaardlykke, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4350 gr.

28. august fingu Marita Poulsen og Jón Lisberg, Sumba, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4650 gr.

28. august fingu Jóhanna Feilberg og Arnfríður Jacobsen, Skálafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3900 gr.

29. august fingu Dorthea Jensen og Martin Thomsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 2600 gr.

29. august fingu Majbritt og Jón Eli Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4150 gr.

29. august fingu Nina og Hentze Joensen, Oyndarfjørður, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4900 gr.

30. august fingu Rannvá Hansen og Jákup Oluf Hansen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3500 gr.

## ANDLÁT

**24. august**
Anna Sofía Hvítklett, Sørvágur 80 ár
Elsebeth Maria Johannesen, vanliga nevnd Bette, 89 ár
Regin Bjørgheim Joensen, Tvøroyri, 68 ár

**25. august**
Marita Sámalsdóttir Petersen, 60 ár

**26. august**
Elly Poulsen, ættað úr Mikladali, búsitandi í Havn, 82 ár
Jaspur Feilberg Hansen, Runavík, 68 ár
Petur Martin Danielsen, lærari, ættaður úr Porkeri, búsitandi í Havn, 64 ár

**27. august**
Agnas Petersen, Selatrað, 95 ár
Kári Johannesen, Fuglafjørður, 52 ár
Jonhard Dahl-Jacobsen, ættaður úr Syðrugøtu, búsitandi í Tórshavn, 57 ár
Betta Justinussen, fødd Eldevig, 89 ár

**28. august**
Elisabeth Simonsen, ættað úr Sørvági, búsitandi í Havn, 47 ár

**29. august**
Hermann Thorsteinsson, Klaksvík, 53 ár.

**Gudstænastur 12. sunnud. e. trinitatis**
Saksun: kl. 11,
Hósvík: kl. 14.30 barnagudstænasta, Martin Restorff Jacobsen. (Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan)
Tjørnuvík: kl. 12, altarg., Marjun Bæk
Elduvík: kl. 11, altarg., Uni Næs. (Í Leirvík gongur talvan fyri kristniboðan kirkjunnar).
Gjógv: kl. 12 messa, Emil Olsen
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk
Sørvágur: kl. 11, altarg., David Johannesen
Skála: kl. 11, familjugudstænasta, Jóna Thomsen, barnaráðgevi og Jógvan Fríðriksson
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Tvøroyri: kl. 11, Bergur D. Joensen
Kirkja: kl. 12, altarg.
Hattarvík: kl. 17, altarg., Elsa Funding
Á Leiti: kl. 12, altarg., Erland Beder
Vestmanna; Inga Poulsen Dam
Vágur: kl. 11, Jónsvein Bech
Skúvoy: kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
Christianskirkjan: kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
Húsar: kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti, Alt-kann-henda.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og Junior, kl. 17.30 bønarløta. kl. 18 møti við Thomas Thomassen & Teir 4.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin 2. sept. kl. 14 byrjar sunnudagsskúlin aftur. Fundir verða kl. 11 og kl. 18, Elisabeth og Sámal Jákup tala og leiða. Skótafundir hvønn mánadag. Heimaforbundið byrjar aftur 6. sept.

**»Tíð til Gud«**
Vit koma saman úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21. Høgni Johannesen kemur brasin við einum livandi boðskapi til okkara. Aftaná er drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Hoyvíkar skúli: Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, Elsa og onnur syngja.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18 møti, Jóhanna og Bárður Ljósheim tala og greiða frá virkinum í Pamiut, Grønlandi. Øll eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Sunnudagin kl. 11 familjumøti. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 15.30 bønarløta – kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jónsvein Joensen, barnaansing verður.
3.-9. sept. verður missiónsmøtirøð við Gunnar Hamnøy trúboðara úr Noregi. Møtini verða kl. 20 og barnaansing verður øll kvøldini.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 10-14 temadagur við Ernu Háberg Hansen, kl. 17 landsbøn.
Í morgin kl. 11 morgunmøti v/ Ólavi Jaocbsen, kl. 16 samkomufundur, kl. 22 útmøti við v/ Filadelfia.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli kl. 17 møti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 evang. møti við Eyðun Miðberg.
Mánadagin kl. 20 bíbil- og bønarmøti.

**Filadelfia, Sundalagi**
Í morgin kl. 17 bønarmøti, kl. 18 kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti v/ Juttu og Salli Lognberg. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøtini byrja aftur leygarkvøldið kl. 20. Nýggj eru eins og øll onnur vælkomin. Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við eftirløntum trúboðara, Jóhannes Mortensen, Argir. Eftir møti verður felags náttúrði.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 19 møti v/ trúb. Niels Jákup Nielsen. Menn av Strondum og lovsangsbólkur av Skála luttaka við sangi. Bjóðað verður til drekka. Innsavnan til húsið.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Leif Høj. Sunnudagin kl. 17 møti við Jan Jacobsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Ørkin, Saltangará**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17 við Martin og Oydis Olsen, Rituvík.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19 hjá Anthony og Charles Johansen, Saltangará. Verið hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Símun Jacobsen. Breyðbróting verður – øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6 bøn.
Leygarkvøldið 1. sept. kl. 20 lovsangsløta.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 18 møti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 lovsangsløta, kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin kl. 14.00. Kl. 18.00 verður møti við John og Tove Hammer. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið er caféin opin kl. 21 og leygarkvøldið kl. 21 verður ungdómstreff, filmurin »Left behind« verður vístur.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur – um viðrar.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur, talari: Osvald Kjærbo.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin 1. sept. kl. 19 verður hugnaløta í hølunum hjá Fjallbrúður. Nógvur sangur og tónleikur, hjartaútloddningur og drekkamuður og andakt. Elisabeth og Sámal Jákup Joensen leiða.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur 2. sept. kl. 14, kl. 18 fundur. Øll eru vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
Osvald Kjærbo talar á evangel. møtinum sunnudagin kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 3.9.
kl. 10-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15 Ítriv í kjallaranum. Seyma fýrkantar saman til teppir til Móðir Tehresu felagsskapin. Kostspæl, telving og onnur spøl. **Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491 kostnaður.**
Týsdagin 4.9.
kl. 10-12 Vit baka
**Kvøldseta kl. 19.** Gunhild Michelsen syngur og sigur frá um Kingosangin. Vitjan úr DK av Ældre på Højskole i Udlandet.
Mikudagin 5.9.
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 15 Døgurði Túrur
Hósdagin 6.9.
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 7.9.
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

**Guð er størri enn hjarta okkara og kennir allar lutir!**

Hetta ørindi úr 1. Jóhannesar brævi, stóð á kórsvegginum í kirkjuni í míni heimbygd! í mínum uppvøkstri. Hvat vil tað siga, at Guð er størri enn hjarta okkara? Jú, at hann í miskunn sær undirstreymin í hjarta okkara.

Vit svíkja okkara sannføring ferð eftir ferð. Vit tapa so títt stríðið. Tá ið tapið er veruleiki, hoyrist djevulsins háandi látur úr neðra: Eg vann, ikki satt. Nú er Guð liðugur við teg. Tveit bara vápnini, tí nú er tú mín. – Soleiðis fekk hann so mong.

Men soleiðis nýtist tað ikki at ganga. Tí hóast hjarta dømir okkum, og vit væl vita, at vit eru verjuleys tá ið álopsmaðurin slær til, so stendur tað kortini fast, at um vit eru ótrúgv, verður Guð tó trúgvur. Um vit venda okkum til Jesus, so er hann talsmaður okkara hjá faðirinum, og faðirin sær tá í náði síni eftir undirstreyminum í hjarta okkara. Hann er størri enn hjarta okkara og sterkari enn gíddindi okkara. Tí er ikki neyðugt hjá nøkrum at geva eftir og tapa.

Vit eiga at takka Guði fyri, at hann tekur sær av júst slíkum. Takka fyri, at eg eisini í dag, tá ið hjarta dømir meg, kann krúpa í lívd undir tí sannleika, at hann er størri enn hjarta mítt og kennir allar lutir.

**John S. Myllhamar, trúboðari**